## Chelsea vil keypa Aguero

Álopsspælarin Sergio Aguero hevur leingi verið settur í samband við enska felagið Chelsea, og sambært Mail On Sunday er spælarin farin at nærkast felagnum. Umboð fyri Chelsea hava hildið fund við umboðsmannin hjá Aguero, og Chelsea er sinnað at gjalda spanska felagnum Atletico Madrid 330 milliónir krónur fyri spælaran, sum er ættaður úr Argentina. Aguero er 21 ár gamal, og Chelsea vil hava hann við tíðini at avloysa Drogba og Anelka, sum báðir eru farnir um 30 ár.



## Arsenal krevur endurgjald

Niðurlendski álopsspælarin Robin van Persie fekk ein álvarsligan skaða, tá ið hann her fyri spældi landsyst ímóti Italia, og í Arsenal eru tey so fortørnað um skaðan, at tey fara at krevja endurgjald frá niðurlendska fótbóltssambandinum. - Vit vilja hava eitt fíggjarligt endurgjald fyri tann skaða, sum okkara møguleikar fyri at vinna meistaraheitið hava fingið. Tað er sera keðiligt at missa ein spælara oraska av einum vinardysti, sigur Arsene Wenger. Roknað verður við, at van Persie í fyrsta lagi kann spæla aftur í apríl mánaði.

# Norskur stórsigur og danskur niðurtúrur

### Noreg vann stórsigur á Kina, meðan Danmark tapti sera óvæntað ímóti Angola



Heri Símonsen

Danmark hevði ein risamøguleika at spæla seg í HM-hálvfinaluna í dag. Men donsku hondbólts-kvinnurnar tóku ikki av møguleikanum. Rættiliga óvæntað tapti Danmark 23-28 ímóti Angola, sum óivað vann sín minniligista sigur í angolsku hondbóltssøguni. Støðan í hálvleikinum var javnleikur 14-14. Hóast angolsku kvinnurnar bert finu síni fyrstu stig í millumumfarinum, so fegnaðust tær um sigurin, sum høvdu tær vunnið heimsmeistaraskapið. Louise Mortensen var stórliga saknað á danska liðnum, men venjarin Jan Pytlick staðfesti, at Louise Mortensen var ikki nógv væl fyri, og tí kom tað ikki upp á tal at brúka Louisu Mortensen. Nú valdar óvissa, um Danmark fer at megna at spæla seg í HM-hálvfinaluna, sum verður í Nanjing fríggjadagin. Skal Danmark vinna seg í hálvfinaluna, so mugu donsku kvinnurnar vinna á russisku heimsmeistarunum. Tapir Danmark ímóti Russlandi, so má Eysturríki vinna á Fraklandi, um danski hálvfinalu-dreymurin skal gerast veruleiki.

### Gekk galið í seinna hálvleiki

Danska liðið hevði stórar trupuleikar við tí offensiva angolska verjuspælinum, og í byrjanini av seinna hálvleiki vóru donsku kvinnurnar útspældar, tá Angola fór frá 14-14 og upp til eina 19-14 leiðslu. Danmark háláði seg upp á 20-22, men so dragnaði aftur, og angolska sensasjónin var ein veruleiki.

Tað var bert Trine Truelsen, sum kundi verða nøgd við sítt avrik á danska liðnum. Hon skeyt níggju mál í dystinum.

### Einki mál í eitt korter

Noreg vann ein tryggan 34-19 sigur á kinesisku vertunum. Tað sum var mest minniligt við dystinum var, at norski málverjin Terese Pedersen helt norska málið reint í 15 minuttir og 31 sekund. Hetta var í fyrru helvt av seinna hálvleiki, og hesa løtuna hevði Terese Pedersen 10 bjargingar á røð, harav eisini eitt brotskast. – Alt gekk eftir bókini, og tað er sjálvandi at fegnast um, at eg fekk gjørt mítt avrik, segði Terese Pedersen við VG aftaná dystin. Málverjuvenjarin hjá norska liðnum, svenskarin Mats Olsson eigur sjálvur metið, tá hann á sinni ímóti Danmark helt málið reint í 23 minuttir, og hann var ógvuliga fegin um avrikið hjá Terese Pedersen.



Jan Pytlick heldur sær um høvdið, og tað er ikki so løgið. Tað kann væl vera, at Danmark spilti sær framúr møguleika fyri einum hálvfinaluplássi, tá jarnkvinnurnar taptu móti Angola
Mynd: Polfoto

### Spania týsdagin

Spania hevur sjey stig, meðan Noreg hevur seks stig, og júst hesi bæði liðini spæla ímóti hvørjum øðrum týsdagin. Noreg má vinna dystin, um norsku kvinnurnar skulu verða vísar í at vinna seg í hálvfinaluna. Suðurkorea hevur fimm stig, og vinnur Suðurkorea ímóti Rumenia, meðan Noreg tapir ímóti Spania, so fara suðurkoreonsku kvinnurnar framum Noreg á stigatalvuni. Noreg spælir lagnudystin ímóti Spania klokkan 11.15 í morgin, meðan Danmark spælir sín lagnudyst í hinum millumbólkinum ímóti Russlandi klokkan 13.

## Hondbóltur

**Bólkur 1**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Russland | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 112 | 86 | 26 | 6 |
| 2 Frakland | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 102 | 86 | 16 | 6 |
| 3 Danmark | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 104 | 97 | 7 | 6 |
| 4 Eysturríki | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 100 | 112 | -12 | 2 |
| 5 Angola | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 94 | 107 | -13 | 2 |
| 6 Týskland | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 92 | 116 | -24 | 2 |

**Bólkur 2**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Spania | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 102 | 85 | 17 | 7 |
| 2 Noreg | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 111 | 90 | 21 | 6 |
| 3 Suðurkorea | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 116 | 108 | 8 | 5 |
| 4 Rumenia | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 120 | 95 | 25 | 4 |
| 5 Ungarn | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 93 | 105 | -12 | 2 |
| 6 Kina | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 75 | 134 | -59 | 0 |

## Svøríki setti HM-met

### Svøríki skoraði 66 mál ímóti Australia



Heri Símonsen

Í gjár kom minniligt úrslit í HM-troystkappingini "Presidents Cup", og var tað Svøríki, sum slapp at seta eitt heimsmet.

Svenska kvinnulandsliðið skrivaði seg í hondbóltssøgubøkurnar í gjár, tá tær vunnu heili 66-21 á Australia.

Svensku kvinnurnar hava ikki somu avrik at vísa á sum donsku og norsku kvinnurnar, men nú hava tær so megnað nakað, sum hvørki norsku ella donsku kvinnurnar hava megnað higartil.

Tað vóru serliga vengurnir, Matilda Boson og Jenny Wikensten, sum høvdu ein góðan dag. Matilda Boson skeyt 12 mál, meðan Jenny Wikensten skeyt 11 mál.

Svøríki gjørdist eisini í dag tað fyrsta landið í søguni, sum hevur skotið meir enn 60 mál í einum dysti í einum HM-endaspælið í hondbólti.

## Úrslitini í millum-umfarinum

**Bólkur 1**

| | |
|---|---|
| Týskland-Russland | 22-34 |
| Frakland-Angola | 33-24 |
| Danmark-Eysturríki | 30-27 |
| Eysturríki-Týskland | 26-29 |
| Russland-Frakland | 23-24 |
| Angola-Danmark | 28-23 |
| Týskland-Angola | 15/12 |
| Frakland-Eysturríki | 15/12 |
| Danmark-Russland | 15/12 |

**Bólkur 2**

| | |
|---|---|
| Rumenia-Kina | 40-19 |
| Noreg-Suðurkorea | 27-28 |
| Ungarn-Spania | 21-21 |
| Suðurkorea-Ungarn | 28-28 |
| Kina-Noreg | 19-34 |
| Spania-Rumenia | 26-25 |
| Ungarn-Kina | 15/12 |
| Noreg-Spania | 15/12 |
| Rumenia-Suðurkorea | 15/12 |